

# Gott VOX hóast alt



**Seinast á pallin hóskvøldið var VOX, sum hevði eina góða framførslu, hóast nakrir ljóðtrupulleikar vóru**

UMMÆLI
*Oddur á Lakjuni*
*planet@sosialurin.fo*

Seinast á pallin hóskvøldið kom gospelkórið VOX úr Eysturoynni. Tað var ikki meira enn at ungu, vøkru fólkini sóðust í mjørkanum, sum roykmaskinan blásti uppá innipallin í Kelduni hesa løtuna. Kórið sjálvt er átjan sangarar, og afturat sær høvdu tey tónleikarar, m.a. vóru fyri fyrstu ferð blásarar við.

Tey framførdu gospeltónleik, soleiðis, sum vit kenna hann. Popput gospelkór, ofta við løttum, funkutum tónleiki.

### Ringt ljóð

Ljóðið var ikki alla tíðina gott. Fyrstu sangirnir vóru ofraðir í royndini hjá ljóðmanninum at fáa tað at ljóða betri. Fyrsta røddin hoyrdist illa, og ljóðið sum heild leyp saman.

Tað batnaði tó nakað. Ljóðblandið bleiv betri, men tað tyktist, sum um tað ongantíð bleiv ordiliga gott inni í rúminum. Men tá ið tey fóru yvir í meira friðarligu sangirnar, hoyrdist, at kórið veruliga syngur væl. Bólkurin spældi eisini væl – serliga lá væl fyri hjá ungu monnunum, sum spældu gittar og bass.

Allir tekstirnir vóru á enskum og vóru typiskir amerikanskir lovsongstekstir, við nógvum endurtøkum; soleiðis, sum tað plagar at vera til tílíkan tónleik. Og allir vórðu teir varpaðir uppá ein stórskíggja.

Tey framførdu sjey sangir, tveir av hesum høvdu tey ongantíð framført fyrr. Onkur heilt kendur gospelsangur var eisini við. T.d. kendi sangurin ”Leave It There”, sum tey eisini hava sungið saman við Ettu Cameron. Kórleiðarin Ásbjørn Bertholdsen sang sjálvur solo í hesum sanginum.

### Blásarar til sín rætt

Eisini sungu tey ”looking Out For Me” hjá Kirk Franklin. Í hesum sanginum komu blásarnir veruliga til sín rætt. Her lærdi Ásbjørn eisini áhoyrarnar at syngja fleirraddað við í niðurlagnum.

VOX eru eini 30 ung fólk, og tað er natturligt, at teimum dámar væl, tá ið tað er lív í og er stuttligt. Men tað var serliga í friðarligu sangunum, tá dentur var á sjálvum kórsanginum, at tað hoyrdist, at tað var góðska í. Ein konsert, sum VOX, hóast ljóðtrupulleikar, sluppu væl frá.

*VOX spældu og sungu hart, men tað var serligaí friðarligu løgunum, at góðskan á kórinum kom til sjóndar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*